

## Kommunusamanlegging í Vágum

Sáttmáli er gjørdur millum bygdaráðini í Miðvági og Sandavági um kommunusamanlegging. Kunnandi fundur verður í Miðvágs Skúla leygardagin 27. klokkan 15. Mánadagin 29. frá klokkan 10 á morgni til klokkan 20 verður vegleiðandi fólkaatkvøða á sama staði. Almennur bygdaráðsfundur um góðkenning av sáttmálanum verður klokkan 21. Grundleggjandi fyri samanleggingina er: tryggja betri tænastu, meira burturúr rakstri og íløgum og allir borgararnir í báðum kommununum fáa somu skyldur og rættindi. Sáttmálin er almannakunngjørdur á heimasíðuni hjá Miðvágs kommunu.

# Samgonguskjalið undirskrivað

**Eftir ein tíma langan tíðindafund í Løgtinginum, skrivaðu samgonguleiðararnir Jørgen Niclasen, Kaj Leo Johannesen og Jóannes Eidesgaard undir nýggja ABC samgonguskjalið**

TÍÐINDAFUNDUR
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*



*Teir tríggir floksformenninir í samgonguflokkunum, tá samgonguskjalið varð undirskrivað hósdagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Eftir at hava hildið samgonguskjalið dult fyri almenninginum síðani samráðingarnar vórðu lidnar, var tað lagt fram á einum tíðindafundi í Løgtinginum klokkan 17.00 í gjár.

Systematiskt varð gingið gjøgnum øll høvuðspunktini í samgonguskjalinum, sum hevur heitið »Altjóðagerð, Sjálvbjargni og Samhaldsfesti«.

### Nýggjur evropapolitikkur

Undir fyrsta partinum í samgonguskjalinum, sum eitur Altjóða- og uttanríkismál, varð serliga stórur dentur lagdur á at ein nýggjur evropapolitikkur verður settur í verk, har arbeitt skal verða fram móti at fáa í lag betri samstarv við ES og at knýta Føroyar tættari at ES.

Eisini varð dentur lagdur á kanningararbeiðið um møguleikan fyri EFTA-limaskapi heldur áfram.

Kaj Leo Johannesen, sum í dag varð tilnevndur nýggjur løgmaður, fegnaðist serliga nógv um at nýggjur evropapolitikkur verður stungin út í kortið, og legði dent á at hetta málið verður eitt av teimum mest týðandi fyri komandi árini.

### Stórar samfelagsíløgur

Undir fíggjar- og búskaparmálum er tað serliga samfelagsíløgurnar, sum fylla nógv, og sum kunnu gerast sera tungar at bera, havandi í huga at samgongan ætlar at fáa fíggjarlógina at geva avlop í niðurgangstíðum, samstundis sum skattasteðgur verður settur í verk á lønarinntøkum.

Millum tyngru málini eru Sandoyartunnilin, sum hol skal setast á í 2011, tá Norðoyatunnilin er útgoldin. Samstundis verður Skálafjarðatunnilin latin á privatar hendur, soleiðs at landskassin ikki kemur at bera byrðuna ella ábyrgdina av hesum.

Landssjúkrahúsið skal framhaldandi út- og umbyggjast, samstundis sum bæði flogvøllurin skal leingjast og skúladepilin í Marknagili verður settur í gongd sum skjótast.

Nógv umtalaði búskapargrunnurin skal eisini setast á stovn, og har skulu serinntøkur frá millum annað privatiseringum setast í. Eisini skal barnafrádrátturin hækkast og sjúkrakassagjaldið takast av.

### Blokkstuðul til kommunurnar

Kaj Leo Johannesen, løgmaður, legði eisini dent á at hann fegnaðist um, at henda samgongan nú fer undir ein kommunalreform. Kommunurnar skulu savnast í størri eindir, eins og ætlanin hevur verið leingi, og málsøki skulu leggjast út til kommunurnar at umsita. Samstundis skal ein blokkstuðulsskipan setast í verk til kommunurnar. Eisini varð tosað um útjavningarskipan, sum skal tryggja at jøvn tænasta verður veitt í teimum ymisku kommununum.

### Vilja rætta hond til andstøðuna

Kaj Leo Johannesen staðfesti eisini, at henda samgongan ikki er heilt eiðasør á sjálvsstýrisleiðini. Nakrar yvirtøkur verða framdar í hesum samgonguskeiðinum. Har kunnu nevnast útlendingamál, flogferðsla og loftrúmið, útlendingamál, persóns- og arvarættur umframt sjórættur og revsirættur.

Hesar yvirtøkurnar eru ikki kostnaðartungar, og Kaj Leo Johannesen staðfesti, at talan er um útreiðslur á leið við 17 til 20 milliónir krónur til rakstur av hesum økjum.

- Eg vil rætta hondina út og eg eri áhugaður í, at andstøðan á tingi eisini kann verða ein partur av hesum samgonguskjalinum, tí at samgonguskjalið her er bygt á samgonguskjalið frammanundan, segði Kaj Leo Johannesen á tíðindafundinum.

# Má velja millum skúlan og Løgtingið

**Fyrrverandi tingmaðurin, Óli Breckmann er nú komin í eina álvarsama tvístøðu. Talan er um hann annaðhvørt heldur áfram sum lærari fulla tíð á studentaskúlanum í Hoydølum, ella um hann aftur fer í Løgtingið. Møguleikin fyri hesum seinna hevur stungið seg upp, nú trý tingfólk hjá Fólkaflokkinum eru útnevnd landsstýrisfólk í nýggju samgonguni**

POLITIKKUR
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*

Nýggja samgongan millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin gevur Fólkaflokkinum tríggjar landsstýrissessir. Jørgen Niclasen kemur at sita á uttanríkismálum, Annika Olsen fer í Innlendismálaráðið og Jacob Vestergaard í Tilfeingismálaráðið.

At trý tingfólk koma í Landsstýrið merkir at trý tey næstu á listanum sleppa í Løgtingið. Hesir eru Bjarni Djurholm, Heðin Zachariassen og Óli Breckmann. Taka teir av og fara á Ting, er Rodmundur Nielsen fyrsti maður og Kitty May Ellefsen næsta fólk á listanum.

### Ikki avgjørdur

Óli Breckmann hevur sitið á Tingi í heili 34 ár, men gjørdist ov stuttur til valið í januar. Hann hevur síðan august starvast í sínum borgarliga starvi, ið hann hevur verið í farloyvi frá, síðan hann kom á Ting. Spurdur um hann ætlar at fara aftur á ting ella um hann ynskir at halda áfram á skúlanum greiddi hann frá, at hann ikki hevði tikið nakra avgerð enn. – Eg má fyrst tosa við tey fólkini, sum eg skal tosa við, segði hann. Biðin um at siga hvat honum nú dámdi at vera aftur í sínum borgarliga starvi, lýsti hann tað við orðinum, - fantastiskt!

Í verandi løtu er hann í eini tvístøðu. Tekur hann ikki av at fara á Ting aftur, verður møguleikin handaður Rodmundi Nielsen.